# Pedagogar

**Býlingshúsið á Flat søkir eftir 4 pedagogum.**

**Størvini**
Talan er um eitt pedagogstarv, 40 tímar um vikuna, í vøggustovu við 12 børnum. Tvey pedagogstørv, 30 tímar um vikuna, á barnagarðsstovu við 21 børnum. Og eitt pedagog farloyvisstarv í eitt ár, 35 tímar um vikuna, á barnagarðsstovu við 21 børnum.

**Vit bjóða**
áhugaverd størv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt og er førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett tann 1. august 2000 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

**Meira fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Katrin Joensen, dagstovnaleiðara tlf. 318371, ella Katrin Petersen, samskipara, tlf. 31560.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Býlingshúsinum á Flat, Per Mohrsgøta 11, 188 Hoyvík, í hendi í seinasta lagi 13. juni 2000. Tilskila á umsóknina hvat starv tygum søkja.

# Pedagogar og hjálparfólk

**Frítíðarskúlin hjá Tórshavnar kommunu søkir eftir pedagogum og hjálparfólkum**

**Vit bjóða**
Vit bjóða eitt spennandi starv, til ansingarskipanina fyri børn í skúlaaldri. Í arbeiðinum, sum hevur nógvar avbjóðingar við sær, verður dentur lagdur á at veita børnunum eitt spennandi og mennandi frítíðartilboð á einum tryggum sosialum grundarlagi.

**Vit ynskja**
Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt, er kreativur og førur fyri at taka avgerðir í arbeiði sínum.

**Setunarviðurskifti**
Størvini verða sett 7. august 2000 ella eftir nærri avtalu. Løn sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Føroya landsstýri.

Um pedagogar ikki verða settir í pedagogstørvini, verða hjálparfólk sett ístaðin í tíðaravmarkað starv.

**Meira fæst at vita**
Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Manbjørn Mortensen, samskipara, tlf. 214678.

**Umsókn**
Umsóknir, saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 15. juni 2000.

Tórshavnar kommuna



Fróðskaparsetur Føroya

# Hægri lestur á Føroyamálsdeildini 2000-2002

Í september byrjar exam.art.- og cand.phil.-lestur í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

**Exam.art. í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.**
Lesturin tekur tvey ár og er skipaður helvt um helvt í ein máltátt og ein bókmentatátt, umframt vísindaástøði og samskifti.

Endamálið við lestrinum er at ogna sær kunnleika til føroyskt mál og føroyskar bókmentir í eldri og nýggjari tíð. Onnur norðurlendsk mál og norðurlendskar bókmentir eru partar av lestrinum.

Upptøkutreytir eru students- ella HF-prógv. Onnur samsvarandi útbúgving kann góðtakast eftir umbøn í hvørjum einstøkum føri.

**Cand.phil. í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.**
Námið er tvey ára framhaldslestur fyri tey, ið frammanundan hava lokið exam.art.- prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum, og veitir serkunnleika í útvaldum málsligum og bókmentaligum evnum.

Upptøkutreyt er exam.art.-prógv í norðurlendskum, serliga føroyskum máli og bókmentum.

Umsóknarfreistin til bæði námini er 30. juni 2000.

Nærri upplýsingar og umsóknarbløð fáast á:

**Føroyamálsdeildini**
**Fróðskaparsetur Føroya**
**V. U. Hammershaimbs gøtu 16**
**100 Tórshavn, tlf. 315304, fax 318448**
og á
**www.sleipnir.fo/setur/fmd**

# Suðuroyingar!

Alt VVS-arbeiði verður gjørt skjótt og fyri rímuligan prís.
Orkusparandi Thermomatic oljufýr fáast nú fyri einans kr. 3.200.

**Sp/f Poul Hammer**
**Tlf. 372003 / 282941**

# Svimjivenjari søkist

Fuglafjarðar Svimjifelag søkir eftir venjara til svimjiárið 2000-2001.

**Vit kundu hugsa okkum:**
- at tú hevur verið á venjaraskeið ella
- hevur royndir innan svimjing.

**Um hetta hevur tín áhuga:**
Fæst meir at vita, við at venda sær til felagið á tlf. 444187.

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi **15. juni 2000.**

**Fuglafjarðar Svimjifelag**
Norðuri í Bø 3
530 Fuglafjørður

# Lýsing

**Viðvíkjandi gamla kirkjugarði í Vestmanna**

Eftir at kirkjugarðsnevndin hevur verið og sýnað kirkjugarðin, er nevndin komin ásamt um at heita á avvarðandi um at lata við seg koma, um tey hava nakað ímóti at betongkantar, trækantar og aðrar girðingar á ikki viðlíkahildnum grøvum verða tiknar burtur.

Hetta verður gjørt fyri at lætta um viðlíkahaldið av kirkjugarðinum. Freistin at gera vart við seg er sett til 14 dagar.

**Kirkjugarðsnevndin**

# Last- og kranavognskoyring

Øll last- og kranavognskoyring við grabba. Last 3 m³. Krani 1800 kg.

**Tlf. 312779 & 281478**

# SØLUFÓLK TIL BILASØLU

**Dugnaligt og fyrikomandi fólk M/K, sum ikki er bangin fyri at taka fatt søkist til bilasøludeildina.**
**Skrivlig umsókn, løn sambært avtalu.**
**Umsóknir innan 14. juni.**

CITROËN DaimlerChrysler MITSUBISHI
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo
Hoyviksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866

Sosialurin - 311820

# DANNY TRANSPORT

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**



# NORÐURLANDAHÚSIÐ

# AVLOYSARI/ REINGERING

Avloysari søkist til reingering.

Í tíðarskeiðnum 1. juni 2000-1. mai 2001.

Arbeiðstíðin er vanliga 2-4 tímar pr. dag, um morgunin.

Arbeitt verður 2. hvørt vikuskiftið.

Meiri um arbeiðið fæst við at tosa við Heiðvík Hammer, sum er at hitta hvønn dag kl. 09.00-11.00.

Umsóknarfreistin er leygardagin 27. mai 2000.

Umsóknir verða at senda til:

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
Postboks 1260
110 Tórshavn
Att.: Heiðvík Hammer

**NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM**
Telefon nr. 317900 • Telefax nr. 219790

# Stuðulsfólk

Søkt verður eftir stuðulsfólki til 8 ára gamalt barn í Norðstreymoy.

Málið við stuðlinum er, í neyvum samstarvi við Almannastovuna og heimið, at virka fyri einum skipaðum gerandisdegi við fremjandi tilboðum og avbjóðingum og soleiðis stuðla barninum á allan hátt. Uppgávan hjá stuðlinum verður lutvíst eisini at vera um tvey yngri systkin.

Ynskiligt er, at ein mannligur stuðul verður settur, men hetta er tó eingin treyt.

Arbeiðstíðin verður skipað í samráð við familjuna og verður 30-35 tímar um vikuna.

Stuðulin er fyribils játtaður í eitt ár.

Lønar- og setanarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Peagogfelag.

Umsóknir við prógvskjølum mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 06.06.2000 og skulu stílast til:

**Almannastovuna**
Att.: Lene Rauff Nielsen, sosialráðgevi
Postboks 3096
110 Tórshavn

Nærri upplýsingar um starvið fæast á tlf. nr. 315480 lokal 160 hjá Lene Rauff Nielsen og lokal 141 hjá Sigrun Bærentsen.

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

# Laborantur

Kemiska kanningarstovan á Heilsufrøðiligu starvsstovuni er farin undir tvær verkætlanir um vatngóðsku og verður tí søkt eftir laboranti. Starvið, sum er fulla tíð frá 1. juli 2000 til 31. desember 2000, fevnir um hesi øki:

- Sýnistøku
- Kanning av sýnum
- Sending av sýnum til kanningarstovur uttanlands
- Innsavnan av úrslitum
- Saman við leiðara fyri verkætlanina skriva endaliga frágreiðing.

Haraftrat skal viðkomandi vera við í dagliga arbeiðnum á kanningarstovuni.

Tú skalt hava lokið prógv sum laborantur. Royndir innan vanligar kemiskar kanningar, góðskustýring og EDV á brúkarastøði eru ein fyrimunur.

Tú skalt hava koyrikort. Somuleiðis skalt tú hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Rikke Berg Larsen, kemikara, tlf. 315300.

Starvið verður lønt í 15. lønarflokki sambært sáttmálanum hjá Starvsmannafelagnum.

Starvsumsókn, við avritum av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 6. juni 2000.

Debesartrøð
FO-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 31 53 00
Fax. + 298 31 05 08
www.hfs.fo

# Bátur til sølu

Ein SÓMI 800 til sølu, um nóg høgt boð verður givið.

| | |
|---|---|
| Byggiár: | 1986 |
| Longd: | 7,98 m |
| Breidd: | 2,65 m |
| Dýbd: | 1,38 m |
| Brt.: | 5,12 |
| Motorur: | Volvo Penta 200 HK frá nov. 1997 |
| Fiskiloyvi: | bólkur 5D |

Er annars útgjørdur við radara, ekkoloddi, VHF, autopiloti og GPS.

Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til skrivstovu okkara og upplýsa j.nr. 20000316.

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

Bíleggið GREEN hoyggjturkaran innan 1. juni - so hava tit hann áðrenn hoyggingin byrjar



Sosialurin - 311820

**GREEN heitluftsaggregat - serframleitt til føroysk viðurskifti!**

**Ger røttu íløguna fyrstu ferð!**

Tosið við okkum!
Kaj Andreasen & Co
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

GOYMSLUSTÝRING • ÚTKOYRING AV VØRUM • KUNDATÆNASTA

# Goymslumaður til Elding í SMS

Vit sóknast eftir einum goymslumanni til Elding í SMS at byrja skjótast tilber.

**Arbeiðsuppgávur**
Vit vilja bjóða tær eitt spennandi starv í einum umhvørvi í støðugari menning. Tú kemur m.a. at taka tær av goymslustýring, útkoyring av vørum og aðrar fyrifallandi arbeiðsuppgávur sum t.d. kundaavgreiðsla.

Fyri rætta umsøkjaran er talan um eitt avbjóðandi og spennandi framtíðarstarv. Eisini verður møguleiki at luttaka á ymiskum skeiðum.

**Vit vænta**
- at tú er ágrýtin og røkin
- at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- at tú hevur góð samstarvsevni
- at tú er álítandi og fyrikomandi
- at tú hevur teldukunnleika
- at tú hevur koyrikort

Løn sambært nærri avtalu.

Er hetta nakað fyri teg, kanst tú senda eina skrivliga umsókn saman við møguligum prógvum og viðmælum til okkara innan 26. mai 2000.

Um tú hevur spurningar um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Símin Hansen, tel 31 96 97.

ELDING
SMS • Postboks 1289 • 110 Tórshavn • Tel 319697

# FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT

SAFARI TRANSPORT

GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR

**Tlf. 32 22 22**